# Drúgv landsliðsferð

**Talan var um eina óvanliga drúgva ferð og óvanliga vánalig hotelviðurskifti hjá føroyska fótbóltslandsliðnum týs- og mikudagin**

LANDSLIÐSFERÐ
*Jákup Mørk/Álvur Haraldsen*




*Talan var um drúgva ferðatíð hjá føroyska landsliðshópinum. Hóast fráferð úr Vágum týsmorgunin, so var tað vorðið til døgurðatíð hósdagin, áðrenn hópurin var komin til Nicosia*

**Nicosia, Cypern**: Vanliga plagar tað at vera so, tá fótbóltslandsliðið ferðast, at talan er beinleiðis flogferðir úr Føroyum til leikstaðið. Nakað sum ivaleyst hevur minkað um ferðamøðina hjá leikarunum, samstundis sum fyriskipanirnar í FSF hava fingið eina lættari uppgávu enn annars.

Soleiðis er tó ikk hesaferð, nú føroyski landsliðshópurin skal til Cypros og Írland at leika. Hóast veingjabreiðið hjá Atlantsflogið er vorðið alsamt størri seinnu árini, so er ein ferð til Cypros enn í meira lagi, og tí verður ferðin hesaferð gjørd í fleiri tempi.

Heimligi parturin av ferðalagnum savnaðist á flogvøllinum um 10'tíðina týsdagin, og kl. 11 var so farið við vanliga rutuflogfarinum til Kastrup, har Jón Rói Jacobsen og Andrew av Fløtum løgdust afturat hópinum.

Her skuldi so bíðast í eini fýra tímar, áðrenn leiðin gekk til Heathrow í London, sum varð millumstøð mikunáttina. Har komu so eisini Julian Johnsson, Fróði Benjaminsen og tann í Onglandi búsitandi Claus Bech Jørgensen afturat hópinum.

Tað vóru tó ikki allir, sum vóru eins fegnir um hotelviðurskiftini í Luton. Eftir teimum standardum, sum landsliðið vanliga ferðast eftir, so var hetta nakað langt undir miðal, men hóast alt, so vóru tað tó fleiri av leikarunum, sum dugdu at síggja sær onkran stuttleika í hesum. Eitt nú við at vanliga air-condition var skift út við vindeygu, sum ikki kundu opnast, og at sengurnar ikki vóru reiddar upp. Snøgt sagt, so mundi hetta hotellið einamest vera at sammeta við eitt herberg av onkrum slag, og í øllum førum livdi tað so langt ífrá upp til tað, sum lovað var, tá hugt var á alnetinum undan ferðini.

Hvussu var og ikki, so varð kósin hósmorgunin sett móti Luton Airport, sum eitt nú enska landsliðið plagar at brúka til sínar fráferðir. Fýra tímar seinni sessaðist flogfarið í Nicosia, har hotelviðurskiftini vóru nakað munandi betri, og so var føroyska liðið til reiðar at fara undir fyrireikingarnar.

Hesar bjóða millum annað upp á venjing í 32 hitastigum, og so er at vóna, at okkara menn hesaferð eru betri førir fyri at tackla hitastigini, enn teir vóru í Sveis á sinni.



*Hotelviðurskiftini í Luton vóru ikki av teimum bestu, og tað var langt ífrá allastaðni, at sengurnar vóru reiddar upp*

# Suverenar AB-gentur

Tær 12-14 ára gomlu genturnar hjá AB hava verið í einum flokki fyri seg í ár. AB hevur í nógv ár havt eina sera sterka gentudeild, og í ár hevur einki undantak verið í so máta. Genturnar hjá AB hava í ár vunnið føroyameistaraheitið, steypakappingina, AB-Cup og eisini vunnu tær stóru donsku kappingina, Limfjords-Cup, sum tær tóku lut í fyrr í ár.

**tn**




*Gentumanningin hjá AB: Aftast frá vinstru Katrin Andersen, Valgerð Andreasen, Vanja Olivarsdóttir, Jeanett Holm, Rannvá Jarnskor og Sjúrður Hansen, venjari.*
*Í miðjuni: Gunnhild Bjørk, Hanna Heinesen, Theresa Petersen, Olga Kristina Hansen og Rakul Johannesen.*
*Fremst Anja Joensen, venjari. Á myndini vanta Lisa í Liða og Bjørt Miðberg*




## Skeið innan trivna og umhvørvi á arbeiðsplássinum

Serfrøðingar frá CRECEA (fyrrv. BST) vóru í Føroyum í juni og hildu seminar innan fleiri av hesum skeiðum, ið vit fara at bjóða nú í novembur. Nógv fólk nýttu høvið at hoyra teir, og eftirmetingarnar vóru ógvuliga góðar.

### At skilja og loysa konfliktir

Konfliktir eru avbjóðingar, ið lívið gevur okkum - og vit sleppa ikki undan teimum. Tær fylgja við eini og hvørjari broyting. Fyri at kunna gagnnýta tær menniskjaligu ressoursurnar, verða vit noydd at vita, hvussu vit skulu fyrihalda okkum til teir hættir, vit eru saman uppá - bæði í arbeiði og í privatlívi, og vit mugu tosa saman og verða samd um nýggjar hættir - tí annars drukna vit í konfliktum og trætum.

***Innihald:***
Skeiðið gevur møguleika til at fáa tosa um og ment, hvussu vit handfara okkara konfliktir á arbeiðsplássinum og skapa eitt trygt forum, har vit kunnu venja eitt meira tilvitað samskifti.

Skeiðið snýr seg um:
- At skilja konfliktir
- At møta konfliktum
- Ikki-harðligt samskifti
- Samskiftis- og konfliktvenjingar

Luttakararnir skulu vera fyrireikaðir uppá aktiva luttøku við at verða opnir viðvíkjandi egnum aktuellum trupulleikum og við luttøku í ymiskum samskiftis- og konfliktvenjingum.

***Skeiðleiðari:***
Lene Bilde Jacobsen, arbeiðs- og organisatiónspsykologur, certifiseraður konfliktvegleiðari.

**Dagur: 9. nov, kl. 09:00 - 16:00**



### Onnur skeið innan trivna og arbeiðsumhvørvi:

**Sjúkrafrávera - spill av góðum kreftum**
8. og 9. nov, kl. 09:00 - 16:00
**Psykiskt arbeiðsumhvørvi og organisatiónsmenning**
10. og 11. nov, kl. 09:00 - 16:00
**Temadagur: Heilsubetran á arbeiðsplássinum**
10. nov, kl. 09:00 - 16:00
**Ergonomiskt og psykiskt arbeiðsumhvørvi**
11. og 12. nov, kl. 09:00 - 16:00

Skeiðlýsingar fyri hesi skeið eru at finna á heimasíðu okkara á www.kvasir.fo.
Vit veita eisini serlig tilboð til stovnar og fyritøkur. Tit eru vælkomin at seta tykkum í samband við okkum um hetta. Vit bjóða okkum eisini til at koma út til tykkara at greiða meira frá hesum skeiðum.

KVASIR
**Tel 320 204 - www.kvasir.fo - kvasir@farodane.fo**


# Heilsuprofil til hvønn einstakan

**10. november skipar skeiðstovan Kvasir fyri evnisdegi undir heitinum heilsubetran á arbeiðsplássinum. Har verður millum annað høvi hjá tí einstaka at fáa ein heilsuprofil**

HEILSA
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*




*Millum annað ber til at máta blóðtrýst, blóðsukur og kolestorol á evnisdegnum, Heilsubetran á arbeiðsplássinum, sum skeiðstovan Kvasir skipar fyri*

*Tilvildarlig mynd: Jens K. Vang*

Heilsuprofilur av tí einstaka er ein av valmøguleikunum luttakararnir á evnisdegnum, sum Kvasir skipar fyri, kunnu velja ímillum. Heilsuprofilurin verður gjørdur av persónum hvør sær, og millum annað ber til at máta kolestorol, blóðsukur og blóðtrýst. Eisini ber til at taka konditest.

Evnisdagurin er ein liður í skeiðsrøðini hjá Kvasir um heilsubetran og trivnað í arbeiðsumhvørvinum.

## Skump rætta vegin

Hetta við heilsubetran á arbeiðsplássinum er nakað, sum fyritøkur í til dømis Danmark gera nógva nýtslu av.

Ein fyritøka í Århus, sum eitur FKI Logistex, hevði eina tílíka evnisviku í fjør. Eftirmetingarnar vóru so góðar, og luttakararnir so glaðir fyri hetta, at leiðslan hevur gjørt av at halda eina heilsubetrandi evnisviku einaferð um árið.

– Vit hava somuleiðis valt at fylgja hesum upp við eitt nú roykistoppskeiðum og kantinan hjá okkum leggur meiri dent á heilsugóðan kost, greiðir Klaus Kæstel frá Logistex frá.

Hann sigur, at fyritøkan fór undir hetta átakið til tess at bøta um heilsustøðuna hjá starvsfólkunum.

– Ofta hugsa fólk um at fara til kanningar og so framvegis, men tey koma ikki so langt. Hetta var so kanska eitt skump rætta vegin. Og tá okkara starvsfólk hava tað gott og eru glað, ja, so eru vit tað eisini, sigur Klaus Kæstel og leggur afturat, at sjálvandi er tað eitt pluss fyri arbeiðsinnsatsin og fyritøkuna, at starvsfólkini eru so væl fyri, sum tey kunnu vera.

Umleið helmingurin av starvsfólkunum hjá Logistex tóku av tilboðnum um heilsukanning til tess at fáa ein heilsuprofil av teirra egnu støðu. Onkur vóru funnin, sum høvdu nakrar trupulleikar, og tey vórðu so send til lækna at fáa ta viðgerð, ið teimum tørvaði.

Nógv annað var eisini á skránni hesa evnisvikuna hjá Logistex, og tað verður tað eisini evndisdagin hjá Kvasir.

Millum annað kann nevnast fyrilestur um heilsukost, handfaring av strongd og starvsfólkasamrøður.

Evnisdagurin er frá klokkan 9 til 16 og skeiðsleiðarar verða Crecea Århus konsulentar, Sam Jakobsen, sjúkrarøktarfrøðingur, massørar/zoneterapeutar, avspenningspedagogur, sálarfrøðingur og kostvegleiðari.